BIOGRAFSØGA. Á trettanda degi – 6. januar – vóru 75 ár síðani fyrsti kommunali biografurin lat upp í Oslo. Síðani hevur Oslo Kinematografer havt uppgávuna at undirhalda við filmi í norska høvuðstaðnum. Men nú skal kapping koma í.

75 ár á kommunalum hondum

– Jú, tey eru samd. Tað var " En fin dag" í norskum kykmyndahøllum

Jógvan Hugo Gardar, Oslo

Veitslurómur var á fólki, sum hittust uttanfyri Colosseum Kino í Oslo tann 6. januar. Krúnprinsurin Haakon, hópur av fólki, fýrverkarí og ein heilsan frá Woody Allen var millum tilboðini hendan dagin. Veitsludagurin var komin upp í lag í sambandi við, at kykmyndahallirnar í Oslo hava verið á kommunalum hondum í 75 ár.

Seinasta veitslan

Men hendan veitslan kann skjótt gerast tann seinasta kommunala filmveitslan í norska høvuðsstaðnum. Politikkararnir í býráðnum ynskja at selja kykmyndahallirnar og feløgini aftanfyri filmvísing í Oslo. Í fyrstu atløgu er ætlanin hjá borgarliga býráðnum at selja umleið helmingin av partabrøvunum í Oslo Kinematografer. Samstundis vísir ein kanning, at Oslo hevur ov fáar kykmyndahallir og vitjanin kann gerast munandi betri.

Stjóri fyri Oslo Kinematografer Ingeborg Moræus Hansen, sum sjálv hevur verið politisk virkin innan borgarliga flokkin Høyre, sigur, at privatiseringin ikki er tað hon meinar er best fyri filmstilboðið í Oslo. Í sambandi við 75 ára hátíðarhaldið hevur hon sagt, at tey nú skulu vísa seg sum besta og dugnaligasta útbjóðaran av filmi, og á tann hátt fáa pengafólk til at lata vera við at royna seg.

Trine Schei Grande, ið hevur sessin sum leiðari fyri mentan og útbúgving í Oslo, sigur, at tey í 2001 skulu leggja fram eitt uppskot um at selja ein part av partabrøvunum í Oslo Kinematografer. Hon vil ikki siga, hvussu stóran part tey skulu selja, men kommunan skal framvegis sita á meirilutanum. Grundgevingin fyri at selja partabrøvini, er at fáa til vega pengar til nýggjar íløgur.

Fleiri útlendskar fyritøkur hava víst áhuga fyri kykmyndahallunum í Oslo. Møguligir keyparar eru sviar gjøgnum SF Kino, danir gjøgnum Nordisk film, Sandrew Metronome sum hevur Schibsted aftanfyri seg og so er eitt nýtt felag undir stovnan sum kallast Det Norske Kinoselskap. Schibsted er størsta fjølmiðlafyritøkan í Noregi, og tey eiga millum annað Aftenposten og ein part av norska TV2. Men eisini altjóða filmsfyritøkur hava víst áhuga fyri Oslo Kinematografer.

Serligt mál

Kykmyndahallirnar í Noregi eru yvirhøvur kommunalar. Tað finnast nakrar fáar hallir, sum privat eiga. Hetta hevur gjørt, at filmurin í Noregi í størri mun enn til dømis í Føroyum og í Danmark er ein viðurkendur partur av mentunarlívinum. Filmurin kappast á nærum jøvnum føti við sjónleik, tónleik, myndalist og so framvegis. Norðmenn hava mett filmslistina sum ein týdningarmiklan part av mentanini, og ikki sum nakað sum kann sammetast við McDonalds, Burger King, diskotek og so framvegis.

Men hetta hevur ikki altíð verið so. Orsøkin til, at Oslo Kinematografer varð sett á stovn var ein politisk hugsan sum segði, at best var at hava hetta nýggja fyribrigdið undir almennum eftirliti. Ein kann siga, at hugsanin aftanfyri kommunala drift var bæði politisk og átrúnaðarlig.

Fyrimunurin seinnu árini kann sigast at hava verið at lættari hevur verið politiskt at stýra tilboðnum fyri at sleppa undan bert at bjóða fram Hollywood-filmir. Millum annað hevur Oslo Kinematografer seinastu trý árini havt eitt mentanarpolitisk manifest, sum skal tryggja, at tey sum koma í kykmyndahallirnar í Oslo kunnu velja millum tað seinasta frá Hollywood á jøvnum fóti við filmar aðrastaðni frá, til dømis europeiskar filmar. Her í býnum er árliga eisini ein filmsfestivalur sum kallast "Film fra Sør", har hópurin av filmum frá sunnara hálvu verða vístir.

Ingeborg Moræus Hansen sigur, at hon ikki vil lata nýggjar eigarar sleppa at broyta hetta manifestið, og hon vil stríðast fyri at Oslo eisini framyvir skal bjóða allar filmir í øllum hallum. Tað skulu ikki bert vísast Hollywood-filmir í teimum stóru kykmyndahallunum. Eitt umfatandi tilboð fyri øll er málið.

Hon sigur, at kommunan við sínum virkna leikluti innan film í Oslo hevur tryggjað býnum eitt tilboð sum fáir aðrir høvuðsstaðir hava. Hon sigur, at hennara ynski er at býurin framyvir kann halda fram við hesum, og ikki gerast einsrættaður í úrvalinum av filmum sum áskoðararnir kunnu velja ímillum. Hesum eru tó ikki øll samd við henni í.

Útlendingarnir koma

Privatiseringin av kykmyndahallunum í Oslo er ikki bert ein spurningur um, hvør sum skal eiga hallirnar, men ein spurningur um hvør sum skal bjóða fram filmir. Í mong ár hevur tað verið ein almenn fyritøka, sum hevur staðið fyri útleiganini av filmum til norskar kykmyndahallir. Hetta er nú við at fara í søguna. Í løtuni eru stórar altjóða og serliga amerikanskar fyritøkur við at seta á stovn egnar skrivstovur í Oslo.

Ivar Johansen, sum situr í fíggjarnevndini í býráðnum í Oslo fyri Sosialistisk Venstreparti er ein av teimum, sum ávarar móti privatiseringini. Hann sigur, at higartil hevur stjórin í Oslo Kinematografer avgjørt, hvørjir filmir, sum skulu vísast. Nú óttast hann at Warner bros. Universal, Paramount og líknandi filmsfyritøkur skulu velja út filmirnar. Ivar Johansen óttast, at hetta ikki førir til meir kapping og betri tilboð. Tvørturímóti meinar hann, at hetta vil føra við sær eina einrætting og vánaligar tilboð.

Fjølbroytt tilboð

Ingeborg Moræus Hansen og hennara starvsfelagar hava allatíðina roynt at broyta tilboðið hjá kykmyndahallunum. Roynt hevur verið at leggja til rættis tilboð, sum fólk vilja hava og at finna nýggjar møguleikar í "biografturinum". Eitt tilboð, sum nógvum dámar væl er eitt sokallað matiné-tilboð, har umframt film er høvi at njóta eitt glas av víni.

Í vetur kom so enn eitt tilboð sum lokkar mammur við nýføðingum. Hvønn mánadag verður ein filmur vístur kl. 13.00, og tá koma í hundratals mammur við barnavognum til Saga kino. Her kunnu so mammurnar og einstakir pápar síggja film, meðan arvingurin liggur við síðuna av.

Fleiri hallir

Oslo Kinematografer hava ikki eydnast við at tilpassa tilboðið nóg gott til brúkararnar. Hetta vísir ein nýggj kanning av filmsmarknaðinum í Skandinavia og Baltikum. Hendan kanningin, ið bretska fyritøkan Dodona Research hevur gjørt, vísir at Oslo er tann høvuðsstaðurin í Norður-Europa sum hevur møguleikan til at fáa flest nýggjar áskoðarar.

Sambært Dodona Research kunnu kykmyndahallirnar økja um áskoðaratalið við 40 prosentum tey komandi fimm árini. Í kanningini verður serliga víst á Oslo sum ein býur har møguleikarnir eru góðir til at fáa nógv fleiri til at hyggja eftir filmi. Nevnt verður millum annað, at Oslo manglar kykmyndahallir — og at hesar eiga at byggjast úti í útjaðaranum av býnum har fólk býr. Í dag liggja tær flestu hallirnar í miðbýnum.

Kykmyndasøgan í Oslo

1896: Livandi myndir verða fyri fyrstu ferð sýndar alment í Noregi. Hetta hendi í Cirkus Varieté í Kristiania (Oslo).

1904: Í Stortingsgate 12 verður fyrsta høllin bygd, sum bert skal brúkast til at vísa film í.

1918: Býráðið avgerð at fara í kapping við tær privatu kykmyndahallirnar.

1926: Kykmyndahallirnar gerast kommunalar og Oslo Kinematografer sær dagsins ljós.

1928: Oslo fær sínar fyrstu stóru kykmyndahallir; Soria Moria og Colosseum. Báðar hallirnar eru framvegis í drift. Tær eru broyttar nakað síðani 1928. Colosseum bleiv bumbað undir seinna heimsbardaga, men bygt uppaftur.

1951: Oslo Kinematografer seta áskoðaramet — 8,8 milliónir atgongumerki seld eftir einum ári.

1981: Nýggi Saga kino letur upp. Hetta er fyrsta kykmyndahøllin í Noregi, sum hevur fleiri smærri hallir.

1997: Oslo Kinematografer gerst partafelag.

2000: Býráðið selur ein part av partabrøvunum í Oslo Kinematografer.

2001: Oslo Kinematografer kunnu halda 75 ára hatíðardag. Fevnir í dag um 11 kykmyndastøð við til samans 31 hallum og 8041 sitiplássum. Umleið tríggjar milliónir atgongumerki verða seld um árið.

HØGT AT FLÚGVA.
"Tá ið eg komi heim, trampi eg ikki meira;
eg dansi tango ella salza"

Týskar klumpar og franska sós

Urd Johannesen

Mær dámar ikki serliga væl at flúgva. Ódnin í 1989 loypti ein ordans kvøkk á meg, og eg eri ongantíð heilt komin yvir kvøkkin, hóast tær mongu fráferðirnar og komurnar síðani tá hava gjørt meg minni bangna. Eg havi fingið nógv góð ráð frá vælmeinandi vinum og kenningum, sum ynskja at hjálpa mær, men onkusvegna eru tað bert mínar egnu royndir, ið higartil hava hjálpt. "Drekk tær eina kenning", søgdu fleiri. Men um nú flúgvarin datt niður og eg upp, so ynskti eg ikki at hava Johnny Walker ella ein Jägara við sum fylgisneyta, tá eg stóð frammanfyri Pæturi. Hetta er batnað nakað so við og við sum eg eri blivin meira stinn. "Hugsa um, at tú einki fær gjørt alíkavæl", segði onkur, sum fann eina troyst í ikki at hava tamarhald á støðuni. Men tað var júst hetta, sum gjørdi meg allarmest bangna. Har er bara einki at gera, um okkurt hendir. Tí fann eg mær ofta ugga í at hyggja at smábørnunum, sum vóru við í flogfarinum, tí eg sá, hvussu rólig og glað tey vóru, og eg hugsaði, at verðin kann ikki vera so ónd at gera enda á teirra lívum.

Eg eri her enn - í miðhæddini - so tað hevur gingið higartil. Ja, so væl, at veruligur fjáltur bert kemur á meg, tá ið flúgvarin nærkast flogvøllinum í Vágum. Føroyingar ferðast sum ongantíð áður, hetta prógva tey seinastu hagtølini frá Statens Luftfartsselskab. Fyrr klappaðu allir føroyingar, tá ið flogfarið hevði sett seg, sum um flogskiparin og manning høvdu bjargað okkum lívinum enn einaferð. Nú er tøgn, eingin klappar longur, tí ein flogferð er ikki nøkur stórhending. Hon er meira vorðin ein partur av gerandisdegnum. Sjálv klappi eg altíð innantanna og sendi eina takkarheilsu til flogskipararnar - mínar hetjur, sum høvdu mína lagnu í teirra hond eitt bil.

Mær dámar væl at ferðast, at fáa luft undir veingirnar og sleppa burtur eina løtu. Hóast hugurin flýgur uttan mun til, hvar ein er, so er tað gott viðhvørt at fáa kroppin og sansirnar við. At siggja eina aðra verð enn hana, eg trampi í dagliga. Tí, tá ið eg komi heim, trampi eg ikki meira; eg dansi tango ella salza. Í november í fjør sat eg umborð á einum SAS-flogfari á veg úr London til Danmarkar. Eg hevði luttikið á einari ferðavinnustevnu og var nú á veg heim aftur til Føroya, via Keypmannahavn, skilst. London er fyri meg sum tann lekra glaringin omaná tí sunnu gularótakøkuni. Eg eri nøgd við glaringina, hóast mær dámar væl alla køkuna. Í slíkum førum sum hesum, havi eg ikki stundir til annað. Hetta er "business and pleasure" í røttu raðfylgju. At sleppa leys í London Town er annað enn føroyingar í leðurjakka við rond og hvítum sportsokkum. Har er ein ørgrynna av ymiskum typum í ymiskum litum og fólkini eru í týðiligum mótsetningi til teir heldur gráu stórbýar bygningarnar. Og tó, so megnar onkur at stinga seg burtur úr mongdini. Minnist serliga gentuna við ljósareyðum hári, bláum føls kum pelsi, nalvablus og himmalhøgum plateaustivlum. Rundanum eyguni var alt málað svart, og eftir hennara dialekt at døma, kom hon frá onkrum eystur-evropæiskum landi. Hon bara flenti, prátaði við øll, kíndi síðumanninum um kjálkan, men sá ikki út til at gera haltari hønu mein. Hon setti veruligan dám á hesa løtu, sum flest øll annars nýta til at vera burturstødd. Øll sótu við einum brosi, og nú varð líkamikið, um tað var trongligt, og um vamlisligi lukturin av undirgrund stakk í nasarnar. Eisini hugsaði eg um svigarinnuna, sum er so góð við øll dýr og alt livandi her á jørð, at hon plagdi at geva mýsnum í undirgrundini í London ein ostabita.

Hesa og manga aðra stuttliga løtu sat eg og hugsaði um umborð á flogfarinum á veg til Keypmannahavnar, meðan eg samstundis eisini ilskaðist eitt sindur inn á tunglyndi føroyinga og okkara ótta fyri at vera annaðleiðis. Havi ivast viðhvørt, um Guð ikki gjørdi ein brølara, tá ið hann bert gav fuglunum veingir og ikki okkum menniskjum. Tí so kundu vit liva eitt perlulív eins og tjøldrini, ið flúgva heim til Føroya á Græ karismessu og til heitari lond á heysti. Men tá ið tað nú ikki skuldi verða soleiðis, so er tað frálíkt at sleppa á flog í nakrar dagar. Ella kanska er tað júst hetta, at vit ikki sleppa so lætt vekk, sum ger, at so mong ferðast inn í aðrar verðir innan tónleik, list, bókmentir? Gerandisdagurin hjá okkum líkist eisini gerandisdegnum aðrastaðni, og meðan vit her eru skúlanæmingar, bankalærd ella flakakvinnur, eru vit øll føroyingar, tá ið vit eru uttanlands. Meira føroyingar enn heima. Føroyingar uttanlands fylkjast í flokk og friðhalga tað føroyska, meðan vit her heima hvør í sínum lagi leita ella kaga burtur til onnur støð. Uttanlands var tað nokk at vera føroyingur fyri at sleppa upp í part. Tað ræsta kjøtið og seyðarhøvdini spurdu ongan eftir. Tað smakkaði bara.

"Ja, goddag mine damer og herrer, det er Deres Kaptajn". Henda djúpa og mynduga røddin vakti meg mitt í hesari skortfleingjuni. Flogskiparin boðaði frá, at vit vóru í Kastrup um fáar minuttir. Hann vónaði, at vit høvdu havt eina góða ferð. Jú takk, av tí allarbesta. Tankarnir vóru langt síðani komnir heim til Føroya uttan millumlending, og eg hevði als ikki verið bangin, meðan kroppurin royndi at fylgja við. Uttanfyri gluggan hevði verið av allar fagrasta veðri, undir okkum lógu skýggini sum eitt mjúkt vattteppi, ið vildi balla okkum. Vit lendu. Blett. Í Kastrup. Og aftanfyri okkara flogfar síggi eg Atlantic Airways, sum eisini júst er komin úr Føroyum. Nú kemur so tann keðiligi parturin, har vit skulu standa og bíða eftir viðførinum. Á skíggjanum stendur, at føroyingarnir eisini skulu heinta sítt viðføri her við rulliband nr. A5. Kuffertini byrja at koma. Summi nýggj, summi gomul, onkur holut, fleiri stór, nøkur lítil, flestu døkk í liti, okkurt deiliga reytt, onkur ryggsekkur... men hvat er hatta? Nú kemur okkurt heilt øðrvísi, pikkalítið, myrkt við reyðum strikum, hvørki fuglur ella fiskur . . . men ein gjøgnumskygdur posi við tveimum seyðarhøvdum í. Tey hildu seg eiga alla verðina, hesi bæði deiligu svørtu seyðarhøvdini, sum komu rullandi eftir bandinum sum var tað mest náttúrliga av øllum. Tey flestu lótust ikki um vón, onkur lat sum luft. Eg flenti. Eg var lend í øllum góðum. Eg elski teg Føroyar. Og seyðarhøvd.